# Einki fiskarok er í Klaksvík um dagarnar



*Í morgun lógu tveir partrolarar og eitt línuskip, Smaragd, Safir og Polarstjørnan, við Kósabrúnna í Klaksvík. Í morgin koma línuskipið Klakkur og trolbátarnir Fiskaklettur og Varðin inn at landa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík er einki rok, men í løtum er fitt av landingararbeiði. – Nei, her er ikki rokasligt í løtuni, men heldur ikki einki at gera, sigur Pól Fuglø, landingarformaður**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eini trý skp lógu við Kósabrúnna, tá vit vitjaðu fram við bryggjuni í morgin. Tey vóru partrolararnir Smaragd og Safir, sum landaðu í gjár. Skipini høvdu 126.000 pund tilsamans, meginparturin upsi.

Mánadagin landaðu línuskipini Polarstjørnan og Grani, sum bæði høvdu verið undir Íslandi. Polarstjørnan hevði 100.000 pund og Grani 150.000 pund.

Í morgin kemur línuskipið Klakkur undan Íslandi. Teir hava eini 150.000 pund á umleið 10 setum.

Veiðan hjá línuskipunum undir Íslandi er blandað. Býta vit hana upp í triðingar, er talan serliga um brosmu, longu og hýsu. Lítil toskur er uppi í veiðini hjá føroysku línuskipunum undir Íslandi í løtuni.

Í morgin landa eisini tveir trolbátar í Klaksvík. Fiskaklettur hevur eini 25.000 pund, men óvist var, hvussu nógv Varðin hevur inni.

Pól Fuglø, landingarformaður á Landingarmiðstøðini í Klaksvík, sigur, at umborð á Varðanum søgdu teir honum, at fiskiskapurin hendan túrin hevur verið brúkiligur um náttina, men lutfalsliga minni hevur verið at fingið í dagsljósi.

- Eg spurdi tó ikki, hvussu nógv teir høvdu inni, nú teir koma inn at landa í morgin, men eg vænti, at Fiskaklettur hevur eini 25.000 pund, sigur hann.

## Slakur útróður

Tað hevur verið heldur smáligt við útróðri í Klaksvík seinastu dagarnar. Streymurin hevur verið harður, og lítil roynd hevur verið. Nú er streymurin linkaður aftur, veðrið er gott, og bátar í Klaksvík hava aftur verið á útróðri í nátt.

- Eg haldi ikki, at útróðurin hevur vignast nakað serligt hjá bátunum higartil í heyst, men vónandi verður betur, tá ið líður longur út á heystið og veturin, sigur Pól Fuglø.

Landingarformaðurin heldur, at bátarnir sum heild hava ligið niðanfyri 100 pund á stampin.

- Seinnu árini hava útróðrarbátarnir fingið nógvan fisk, mest sum alt árið, men í fjør byrjaði fiskiskapurin at minka – og í ár hevur útróðurin sum heild eisini verið slakari enn tey góðu undanfarnu árini.

Pól Fuglø sigur, at hampiliga støðugt arbeiði hevur verið á Landingarmiðstøðini.

- Ikki nakað rokasligt, men her hevur verið fitt at gera í løtum, sigur hann.



*- Eg haldi ikki, at útróðurin hevur vignast nakað serligt higartil í heyst, men vónandi verður betur, tá ið líður longur út á heystið og veturin, sigur Pól Fuglø, landingarformaður, sum her stendur undir liðini á Peturi Juul*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bakur og Rókur hampiligan túr

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bakur og Rókur landaðu út við 200.000 pund í Saltangará í vikuni. Hetta er fyrsti veruligi túrurin hjá Róki. Teir hava frammanundan verið ein styttri túr, har skipini landaðu eina minni nøgd í Saltangará.

Á skrivstovuni hjá Beta siga tey, at Rókur vísir seg at rigga væl og er eitt gott skip.

Lerkur, sum er hitt skipið, ið Føroya Fiskavirking hevur keypt, er nú longdur á Tórshavnar Skipasmiðju.

Lerkur liggur nú í Runavík, har maskinverkstaðurin FJM er farin undir at seta nýggju verksmiðjuna upp.

Væntandi verður Lerkur klárur til fiskiskap um einar tríggjar vikur, og tá fara Lerkur og Rókur at partrola.

Bæði Bakur og Stelkur hava verið á beding í Klaksvík, har skipini eru klassað. Hetta arbeiði hevur tikið stívliga 14 dagar hjá hvørjum skipi, og nú eru skipini liðug og fara útaftur at partrola.

Nýbygningarnir, sum Føroya Fiskavirking letur byggja í Spaniu, verða ætlandi lidnir um mánaðarskiftið november/desember og verða væntandi í Føroyum í desember.




*Bæði Stelkur og Bakur eru lidnir á bedingini í Klaksvík og fara nú útaftur at partrola. Vit tóku myndina av Stelki á bryggjuni í Saltangará í morgun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*